
Mynd: Maersk Drilling

# Hava funnið enn meir har norska oljuævintýrið byrjaði

**Jógvan Hugo Gardar**

23.07.2015 - 14:26

Oljan.fo

Knappar 20 kilometrar frá staðnum har norska oljuævintýrið byrjaði í 1969, á Ekofisk-økinum, hevur Statoil funnið gass, og samlaða mongdin er mett til 75 milliónir føt av sokallaðum oljulíkum. Økið kallast Julius.

Ekofisk-økið var har norðmenn funnu tað fyrstu oljuna, og nú er so gass funnið stutt norðanfyri Ekofisk.

Norskir oljumyndugleikar siga, sambært offshore.no, at talan er um gass í eini mongd sum liggur millum 15 milliónir og 75 milliónir oljulíkar.

Granskingarstjórin hjá Statoil, May-Liss Haukness, sigur sambært offshore.no at hetta er eitt prógv um at teirra hugsan er røtt um at sjálvt á gomlum og kendum olju- og gassøksjum er møguligt at finna meir.